# VOX jubileum í Norðurlandahúsinum

Tann 16. august hevur gospelkórið VOX konsert í Norðurlandahúsinum. Hetta er í samband við, at kórið hevur 10 ár á baki. VOX hevur sungið gospel í 10 ár og er vorðið eitt kent navn innan føroyskan kórsang. Kórið VOX hevur tilknýti til Heimamissiónina og er leitt av Ásbjørn Berthelsen. VOX er mannað við dugnaligum útvaldum sangarum. Nógv verður gjørt burturúr 10 ára hátíðarhaldinum. Millum annað eru allir fyrrverandi sangarar bodnir at syngja við. Á konsertini fara ymiskar útgávur av VOX at framføra. Fyrst verður tað sangararnir, sum manna VOX í dag. Síðani verður tað sangararnir, sum hava sungið við, men ikki er í kórinum longur. Til endans syngja øll saman í einum stórum felagskóri á 50 sangarar. Tá verður sungnir fleiri gamlir og kendir sangir. – Vit eru sera spent til konsertina, og vit vóna, at nógv koma at hoyra okkum. Vit ætla í øllum førum at gera nógv burturúr og geva eina rimmar framførslu, sigur Ásbjørn Berthelsen, kórleiðari. Konsertin verður 16. august klokkan 16 í Norðurlandahúsinum. Atgongumerki eru at fáa á kunningarstovunum, í Norðurlandahúsinum og á heimasíðuniwww.nlh.fo



# Ætlanir og ongin fígging



*Kaj Leo Johannesen, Sambandsflokkurin:*

- Har eru stórar ætlanir, men ongin fígging, og tað er og verður dýrt at liva í Føroyum. Ein kann eisini siga, at høvuðsvinnan fær eitt slag í andlitið í løgmansrøðuni, sigur Kaj Leo í stuttari viðmerking, og leggur afturat:

- Røðan kann eisini lýstast við fyrstu ørindunum hjá Fríðrikki Petersen, ið yrkir; "Tíðin rennur sum streymur í á", sigur Kaj Leo Johannesen.



# Føroyar skulu blóma

*Bergtóra Høgnadóttir Joensen, Tjóveldi:*

Umframt, at Bergtóra Høgnadóttir Joensen heldur talan vera um nakað av tí sama, sum er á hvørjum ári, so sær hon eisini ymiskt jaligt í løgmansrøðuni.

- Har eru fiskivinnupolitikkur og broytingar nevndar, og tað er gott, og at blokkniðurskurður er nevndur, metir í hvussu er okkara flokkur er gott.

Vælferðarsamfelagið, mentan og gransking eru nevnd og mugu raðfestast, tí hetta er neyðugt, um trivnaður skal vera í landinum. Og tað er neyðugt at fólk støðast, um Føroyar skulu blóma, sigur Bergtóra Høgnadóttir Joensen í stuttari viðmerking.



# Løgmaður má leggja frá sær

***Jørgen Niclasen, Fólkaflokkurn:***

**- Eg fari at siga, at løgmaður eigur at leggja frá sær! Tað er jú best, so veik sum hendan samgongan er.**

**- Men annars vil eg siga, at løgmansrøðan er ein rósa til undanfarnu samgongu, har vit vóru við, og hon er rós til tað, vit fingu framt og til tær ætlanir, ið vit høvdu. Røðan er tí afturlítandi. Men røðan sigur so heldur ikki nakað um, hvussu nakað í veruleikanum skal gerast, so eg vil siga, at hetta er bæði longsta og samstundis minsta løgmansrøðan, ið eg veit um, sigur Jørgen Niclasen.**



# Vísir á hvat skal gerast

*John Johannesen, Javnaðarflokkurin:*

- Løgmansrøðan er visjónér, frameftirlítandi, og sigur hvørjar ætlanir eru, og minni um hvat er gjørt, og tað er sum tað skal.

- Annars haldi eg eisini, at hon ber boð um 3 flokkar, ið eru nokkso samdir hugsjónarliga. Og víst verður eisini á hvat er neyðugt, og hvørji tøk skulu takast. Mær dámar eisini væl, at røðan setir Føroyar í miðdepilin og sær Føroyar sum eina eind, í kapping við umheimin.

- Skal nakað sigast, so meti eg, at orðini um at fáa føroyingar heimaftur eru bara hálvsøgd, tí har snýr tað seg eisini um at fáa fólk at støðast, so vit ikki missa fólk. Tá vit hava eitt gott samfelag, eisini t.d. hjá einligum mammum, tá hava vit eitt gott samfelag. Hetta eru tvær síður av somu søk, sigur John Johannesen.



# Silvalandið á Summarfestivalinum enn betri í ár...

**Summarfestivalurin saman við Norðoya Sparikassi hevur aftur í ár rullað ermarnar upp, og gjørt sítt til at børnini og familjurnar fáa ein ógloymandi summarfestival, bæði á Vágsbø og á Akursmørk, har stóra Silvalandi ðkemur at húsast dagarnar 7.-9. august.**

TÍÐINDASKRIV



Tað er eingin loyna, at eftir buldrasligu kvirlurnar í fjør, samanborið við avbera góða veðrið, ið nú hevur ligið um landið, so hevur Summarfestivalurin aftur í ár mót uppá, at tað skal gerast ein ógloymandi løta, bæði fyri børnini og familjurnar, ið vitja stóra Silvalandið.

Stóra evnið fyri Silvalandi í ár er: Indiánarar og kovboyarar, og fara hesi at síggjast aftur, tá stóra tiltakið fer av bakkastokki í Klaksvík í komandi viku.

Umframt teir, koma Angela og Hannibal, Basim, Silvi, gyklarar, Oskar, Eldblásarin, karikaturteknari og onnur at framføra og geva sítt íkast.

Ein serlig bommverksmiðja er eisini fingin til vega, og fara børnini at kunna gera sítt egna góðgæti...

So tað verða nakrir spennandi familjudagar á Summarfestivalinum, har alt tað stuttliga gerst enn meira stuttligt...